

## Ísbjarnirnar minka

Granskarar á lærda háskúlanum í Århus hava nú staðfest, at ísbjarnirnar eru minni á vøkstri nú enn fyrr. Tað úrslitið eru granskararnir komnir til, eftir at teir hava kannað ísbjarnaskøltar. Tann elsti skølturin er frá 1892, og kanningarnar vísa, at dagsins ísbjarnir eru níggju prosent minni enn ísbjarnirnar fyri 100 árum síðani. Jyllands-Posturin skrivar frá granskarunum, at helst eru ísbjarnirnar minkaðar, tí tað er minni havísur nú enn fyrr, samstundis sum ymisk umhvørviseitur munnu hava gjørt sítt.

## Farrell sloppin leysur

Tað eydnaðist tíðliga í morgun servandum bretskum hermonnum at fría tíðindamannin Stephen Farrell og tulkin Sultan Munadi, sum vórðu burturfluttir í afghanska landspartinum Kunduz seinasta leygardag. BBC sigur, at ein tyrla setti nakrar servandar hermenn niður uttan fyri húsini, har tíðindamaðurin og tulkurin sótu gíslar hjá einum Taliban-leiðara. Hermenninir skutu Taliban-leiðaran, ein annan mann og eina kvinnu, sigur BBC. Stephen Farrell arbeiðir sum tíðindamaður hjá amerikanska blaðnum New York Times, men hann er bretskur og írskur ríkisborgari.

# Hundur slaktar 20 dunnur

**Ein ókendur hundur hevur í nátt ella tíðliga í morgun dripið einar 20 dunnur sundur við Ovaru Gøtu í Hoyvík. Bert ein dunna var livandi, tá eigararnir komu á staðið**

HUNDALÍV
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*





*- Myndartekstur: Dunnurnar eru at kalla sundurskræddar, og tann einasta, sum var sloppin undan blóðbaðnum inni í garðinum, er so illa bitin, at lívið má takast av henni*

Tá eigari av einum stórum dunnuflokki við Ovaru Gøtu í morgun kom at geva dunnunum føður, var tað ein ótespilig sjón, hann kom til. Umleið 20 dunnur lógu spjaddar runt, sundurskræddar í einum sonnum blóðbaði.

Ein einsamøll dunna, sum var sloppin út úr dunnugarðinum, gekk eftir. Hon var tó so illa bitin, at hon má avlívast.

Løgreglan var longu á staðnum, tá Hendrik Olsen, ein av trimum eigarum, kom til dunnugarðin í morgun. Tá hevði onkur, ið er komin framvið, longu boðað løgregluni frá.

Hundurin lá og goymdi seg inni í dunnuhúsinum. Tá menn royndu at fáa fatur á hundinum, slapp hann tó til rýmingar, og enn er óvist um hundurin er fangaður.

Onkur hevur tó fingið mynd av hundinum við fartelefonini, tá roynt var at fanga hann, og myndin er latin løgregluni.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn greiðir frá, at teir hava fingið fatur á einum persóni, ið saknar ein hund, sum minnir nógv um tann, ið er á myndini. Hundurin er av slagnum Retriever.

Obligatoriska hundatryggingin – um nøkur slík er – eigur at dekka útreiðslurnar hjá eigarunum av dunnunum.

Verða hundurin og eigaramaður hansara funnir, kunnu teir vænta sær eina bót á upp til 600 krónur, tá hundurin ikki hevur loyvi at ganga leysur í Tórshavnar Kommunu, og hartil eisini hevur framt »herverk«.

# Dýrur túrur til Gjáar

**Tveir rørslutarnaðir menn í Klaksvík noyddist at fara við hýruvogni til Gjáar seinasta vikuskifti, og fyri ferð og upphald rindaðu teir um 3000 krónur hvør**

RØRSLUTARNAÐ
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Ferðingarnar eru nógvar hjá teimum rørslutarnaðu fólkunum, og skulu tey hava flutning seint um kvøldið ella um vikuskiftið, eru ongar sersømdir.

Hetta fingu tveir menn í Klaksvík at sanna seinasta vikuskiftið.

Sum limir í Heilafelagnum høvdu teir teknað seg til vikuskiftisuppihaldið, sum er annað hvørt ár við Gjógv.

Báðir búgva í Sambýlinum undir Heygnum í Klaksvík, og teir sita í koyristóli.

Júst hetta vikuskiftið lá ikki fyri hjá nøkrum av teirra avvarðandi at koyra teir til Gjáar, og tí átók Súsanna Olsen, leiðari á Sambýlinum at finna eina loysn.

Hon ringdi fyrst til Miðlan hjá kommununi, og Miðlan beitti hana víðari til sløkkiliðsstjóran.

### Hýrivognurin bíligari

Jú, bussurin hjá Serflutningsskipanini kundi koyra teir til Gjáar, men túrurin fór at kosta umleið 2500 krónur aftur og fram, tí kostnaðurin er 400 krónur um tíman, og so kom tunnilsgjald og annað aftrat.

Súsanna Olsen segði nei takk og fann eina aðra loysn, og tann loysnin var at leiga ein bil. Hesin flutningurin kostaði 1100 krónur. 550 krónur hvønn veg.

Í hesum førinum kundi henda loysnin brúkast, tí menninir vóru rímiliga væl fyri og kundu tí sjálvir seta seg í hýrivognin.

Aftaná viðgongur Finn Hansen, sløkkiliðsstjóri í Klaksvík, at hann hevur gjørt eitt mistak. Gjaldið skuldi verið sum fyri vanligan hýruvogn, soleiðis sum leiðbeiningin fyri bussin eisini sigur.

### Stuðul fór við

Teir báðir rørslutarnaðu menninir kundu ikki fara einsamallir til Gjáar. Stuðul fór við, og teir máttu sjálvir gjalda viðkomandi samsýning.

Samanlagt kom vikuskiftið at kosta teimum umleið 3000 krónur hvør, og tað rindaðu teir fegnir fyri eitt gott vikuskifti. Sjálvt vikuskiftisupphaldið kostaði 500 krónur frá leygardegi til sunnudag.

Til dagligt er skipanin við serflutningsbussinum ein góð loysn, tí brúkararnir kunnu keypa 10-túrakort fyri 100 krónur.

Finn Hansen heldur ikki, at skipanin er nóg góð, tí bussurin koyrir ofta fólk, sum ikki júst hava serflutning fyri neyðini, og tí er ætlanin í kommununi at hava fund um málið í hesi vikuni.

### Vánalig almenn skipan

Støðan í Havn er ikki frægari.

Johan Samuelsen, sum situr í koyristóli, sigur, at mangan er torført at leiga serflutningsbussin, tí hann verður brúktur til nógvan annan flutning. Skalt tú leiga bussin um vikuskiftið, skal hann bíleggjast í seinasta lagi á middegi mikudag.

- Og tað er einki serligt at fara í eina veitslu og ikki hava annan flutningsmøguleika enn henda bussin, tí tá noyðist tú heim longu í seinasta lagi klokan 23, sigur Johan Samuelsen, sum sjálvur nú lítið brúkar skipanina, við tað at hann hevur fingið sær egna bil, egnaður til rørslutarnað fólk.

Hann á hálovar annars Mini Buss Taxa. Har eru álitisfólk, sum altíð kann ringjast til, dag sum nátt. Men bussur teirra er slitin niður, og tað loysir seg ikki hjá teimum at fáa sær nýggjan bussu, tí tað almenna hevur koyringina við rørslutarnaðum um dagin.

- Tað hevði verið nógv frægari at havt serflutningskoyringina á privatum hondum, í staðin fyri at tað almenna liggur og tvætlar uppií og veitir so vánaliga tænastu, sigur Johan Samuelsen.

Hann heldur tað eisini vera løgið, at Tórshavnar kommuna hevur ókeypis busskoyring, tí ókeypis koyringin er ikki galdandi fyri rørslutarnað fólk.

